# Grannskoðaraeftirlitið

# Ársfrágreiðing

## 2018

Skráseting Føroya

Skrivstovuhald:
Skráseting Føroya · Sigmundargøta 13 · Boks 264 110 Tórshavn · Tlf.: +298356010 · E-mail: skr@skraseting.fo

## Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ... 2
2. Lógargrundarlag ... 2
2.1. Reglurnar í Danmark broyttar ... 3
2.2. Grannskoðaraeftirlitið ... 4
2.3 Skrá yvir grannskoðanarvirkir ... 5
3. Virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum ... 5
4. Góðskueftirlit ... 6
4.1 Einki eftirlit í 2018 ... 7
4.2 Góðskueftirlitsfólk ... 7
4.3 Generelt um góðskueftirlit ... 8
4.4 Tilmæli frá góðskueftirlitsfólkunum ... 8

**1. Inngangur**

Grannskoðaraeftirlitið almannakunngerð við hesum árligu frágreiðingina um virksemi sítt.[1]

Grannskoðaraeftirlitið hevur tey árini, góðskueftirlit hevur verið, gjørt avtalu við góðskueftirlitsfólk, starvsett hjá Erhvervsstyrelsen, um at gera góðskueftirlitið á løggildu grannskoðanarvirkjunum. Á skrásettu grannskoðanarvirkjunum hava góðskueftirlitsfólk, sum Erhvervsstyrelsen hevur góðkent, verið biðin um at gera góðskueftirlitið.

Orsakað av hesum, umframt at talan er um fá grannskoðanarvirkir í Føroyum, hevur Grannskoðaraeftirlitið valt at hava góðskueftirlit við fleiri grannskoðanarvirkjum sama ár. Hetta merkir samstundis, at tað verða ár, har einki eftirlit er. Nevnast kann, at góðskueftirlit var við helvtini av føroysku grannskoðanarvirkjunum í 2016, og hinari helvtini í 2017. Tá góðskueftirlit skal fara fram við í mesta lagi 6 ára millumbilum, tó í mesta lagi 3 ára millumbilum hjá grannskoðaravirkjum, ið grannskoða roknskapir hjá virkjum, sum eru fevnd av § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini (sonevnd PIE virkir), varð einki góðskueftirlit gjørt í 2018.

Hetta er áttanda ársfrágreiðingin hjá Grannskoðaraeftirlitinum. Ársfrágreiðingin verður almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya www.skraseting.fo

Grannskoðaraeftirlitið hevði 9 fundir í 2018.

**2. Lógargrundarlag**

Grannskoðaraøkið er undir tættari altjóða regulering og regulering í ES. Politiskt er gjørt av, at Føroyar skulu fylgja hesum reglum. Føroyska lógargrundarlagið hevur tað danska sum fyrimynd, við teimum frávikum, sum føroysk viðurskifti gera neyðug.

Niðanfyri er yvirlit yvir føroyska regluverkið:

[1] § 13 í kunngerð nr. 86 frá 2. juli 2012 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið er soljóðandi: *"Eftirlitið ger eina árliga frágreiðing um sítt virksemi. Frágreiðingin inniheldur yvirskipaðu úrslitini frá góðskueftirlitinum. Úrslitini verða almannakunngjørd í hagfrøðiligum líki uttan at tilskila, hvørji grannskoðanarvirkini eru. Frágreiðingin verður almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya - www.skraseting.fo."*

- Løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015. (grannskoðaralógin)
- Kunngerð nr. 153 frá 23. desember 2016 um grannskoðaraváttanir o.tíl., sum broytt við kunngerð nr. 45 frá 7. apríl 2017
- Kunngerð nr. 4 frá 4. februar 2016 um próvtøku fyri løggildar grannskoðarar o.a.
- Kunngerð nr. 97 frá 23. september 2016 um kravda eftirútbúgving fyri góðkendar grannskoðarar.
- Kunngerð nr. 132 frá 10. desember 2015 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.
- Kunngerð nr. 97 frá 3. oktober 2012 um grannskoðanarbólk í virkjum og samtøkum, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum.
- Kunngerð nr. 87 frá 2. juli 2012 um Grannskoðaranevndina.
- Kunngerð nr. 86 frá 2. juli 2012 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið.
- Kunngerð nr. 25 frá 6. apríl 2011 um skrá yvir góðkend grannskoðanarvirkir og yvir góðkendar grannskoðarar, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 21. mai 2012.
- Kunngerð nr. 92 frá 6. september 2010 um grannskoðaravirksemi.
- Kunnngerð nr. 5 frá 17. februar 2010 um óheftni grannskoðarans og grannskoðanarvirkisins.
- Kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini.
- Kunngerð nr. 5 frá 14. januar 2009 um trygd og ábyrgdartrygging fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar.

## 2.1. Reglurnar í Danmark broyttar

Tann 1. juli 2016 komu í gildi umfatandi broytingar í donsku grannskoðaralógini. Sostatt kunnu føroyska og danska grannskoðaralógin ikki heilt samanberast longur, í øllum førum ikki, tá tað snýr seg um góðskueftirlit. Broytingarnar í Danmark hava m.a. viðført at Revisortilsynet er tikið av. Góðskueftirlit í Danmark verður útint beinleiðis av Erhvervsstyrelsen. Skipanin viðvíkjandi hvussu góðskueftirlitið skal endað og hvørjar avleiðingarnar og reaktiónsmøguleikarnir kunnu verða, er eisini broytt. Tað eru settar í gildi heimildir fyri herdum revsitiltøkum mótvegis grannskoðanarvirkjum og grannskoðarum, ið grovt bróta ella ferð eftir ferð seta til síðis góðan grannskoðanarsið. Minni álvarsom brot, í samband við góðskueftirlit, verða enda við átalu ella boðum um batar.

Í Løglistanum 2018, sum er partur av Ólavsøkurøðu løgmans, stendur m.a. hetta:

***"Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar***

***og grannskoðanarvirkir***

*Endamálið er at dagføra lógina soleiðis, at hon verður í samsvari við seinastu broytingarnar í ES*

*direktivi 2006/43/EF um lógálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum.*

*m.a. hevur hetta við sær, at eftirlitsskipanin verður broytt og revsitiltøkini fyri smærri brot, ið henda fyrstu ferð, verða gjørd meiri lagalig v.m., men fyri meiri týðandi brot verða revsitiltøkini herd."*

Grannskoðaraeftirlitið væntaði tískil, at eitt lógaruppskot fór at verða lagt fyri Løgtingið í tingsetuni 2018. Men nú er freistin farin fyri at leggja lógaruppskot fyri tingið í hesi tingsetuni.

## 2.2. Grannskoðaraeftirlitið

Skráseting Føroya setur Grannskoðaraeftirlitið. Starvs- og fundarskipan Grannskoðaraeftirlitsins er sett í kunngerð nr. 86 frá 2. juli 2012 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið.

Limir í Grannskoðaraeftirlitinum eru:
- Rannvá Sólheim, forkvinna
- Jógvan Amonsson, umboð fyri løggildar grannskoðarar
- Hermund Jacobsen, umboð fyri skrásettar grannskoðarar
- Nina Djurhuus, umboð fyri roknskaparbrúkarar
- Malan Johansen, umboð fyri roknskaparbrúkarar

Varalimir eru:
- Jørmann Petersen, umboð fyri løggildar grannskoðarar.
- Victor Nielsen, umboð fyri skrásettar grannskoðarar.
- Christian Danielsen, umboð fyri roknskaparbrúkarar,

Skráseting Føroya er skrivstova hjá Grannskoðaraeftirlitinum. Starvsfólk á Skráseting Føroya røkja skrivarauppgávuna hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

## 2.3 Skrá yvir grannskoðanarvirkir

P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5821
Sp/f SPEKT løggildir grannskoðarar, skrás. nr. 2732
Sp/f Jørmann Petersen, løggilt grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5095

Sp/f NUMO, góðkent grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5698

Sp/f Agnar á Dul, skrásett grannskoðaravirki, skrás. nr. 5806
Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, skrásett grannskoðanarvirki, skrás. nr. 3868
Sp/f MENTA, skrásett grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5029
Sp/f Revisión Kaj Joensen, skrásett grannskoðanarvirki, skrás. nr. 2320
Sp/f Roknskaparfelagið, skrásettir grannskoðarar, skrás. nr. 2212

## 3. Virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum

Tað yvirskipaða virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum er ásett í §§ 32 – 34 í grannskoðaralógini, meðan nærri reglur fyri virksemi Grannskoðaraeftirlitsins eru settar í kunngerð nr. 132 frá 10. desember 2015 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.

Høvuðsuppgávan hjá Grannskoðaraeftirlitinum er at tryggja, at góðskueftirlitið fer fram í samsvari við lógarinnar reglur, sambært § 27 í grannskoðaralógini.

Góðskueftirlitið fevnir um eina meting av góðskustýringarskipanini, og um arbeiðið og óheftnið í sambandi við tær uppgávur, sum grannskoðarin ger.

Góðskueftirlitið skal fara fram við í mesta lagi 6 ára millumbilum. Góðskueftirlitið skal tó fara fram við í mesta lagi 3 ára millumbilum hjá grannskoðaravirkjum, ið grannskoða roknskapir hjá virkjum, sum eru fevnd av § 19, stk. 3 í grannskoðaralógini (sonevnd PIE virkir).

Viðv. § 19, stk. 3 er talan um grannskoðanarvirkir, ið grannskoða:

1) Virkir, ið hava virðisbrøv, ið verða handlað á einum skipaðum marknaði í einum ES-landi ella einum EBS-landi, og
2) virkir, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum, tó ikki virkir, ið fáast við tryggingarmeklaravirksemi sambært § 42 í lógini um tryggingarvirksemi og reglum settar í gildi við heimild í hesi, og virkir, ið eru fevnd av kapittli 20 a

(íløguráðgevar) í fyriskipan om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed.

Tá ið góðskueftirlit fer fram á einum grannskoðanarvirki, skal virkið geva Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum høvi til at gera tær kanningar, ið mettar vera neyðugar, og skal syrgja fyri, at Grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkið fáa tær upplýsingar og ta hjálp, ið verður mett neyðug til tess at gera góðskueftirlitið. Grannskoðarar, ið eru knýttir at grannskoðanarvirkinum, hava samsvarandi skyldu mótvegis Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum.

Tá ið góðskueftirlitið er endað, skal góðskueftirlitsfólkið gera eina frágreiðing, ið skal sendast til Grannskoðaraeftirlitið. Frágreiðingin skal innihalda eina lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið av kanningini og eina meting av úrslitinum av kanningini.

Grannskoðaraeftirlitið kann biðja góðskueftirlitsfólkið og grannskoðanarvirkið um tey skjøl og ta hjálp, sum Grannskoðaraeftirlitið metir vera neyðugt, til tess at eftirlitið kann taka støðu til, um tað hjá tí kannaða eru skeivleikar, manglar, ella øki, har ábøtur kunnu verða gjørdar.

Grannskoðaraeftirlitið tekur støðu til, um eftirlitið av tí kannaða gevur høvi til:

1) at eftirlitið verður endað uttan fleiri viðmerkingar,
2) at átala skal verða givin uttan onnur tiltøk, innan ta næstu vanligu eftirlitsvitjanina
3) at átala við eftirlitsvitjan skal verða givin, ið skal vísa, um viðurskiftini eru komin í rættlag.

Grannskoðaraeftirlitið tekur eisini støðu til, um komið er fram á skeivleikar ella manglar hjá teimum kannaðu, ið geva orsøk til at leggja málið fyri Grannskoðaranevndina, ákæruvaldið ella aðrar myndugleikar. Harumframt kann Grannskoðaraeftirlitið áleggja grannskoðanarvirkinum at broyta frágreiðingina um gjøgnumskygni beinanvegin.

**4. Góðskueftirlit**

Tey fyrstu eftirlitini vóru í 2011. Eftirlitini, sum vóru í 2011-2013, vóru øll tænastueftirlit. At talan var um tænastueftirlit merkir, at Grannskoðaraeftirlitið, áðrenn eftirlitið fór fram, tók avgerð um, at einki mál skuldi leggjast fyri Grannskoðaranevndina, uttan í teimum førum, har eitt grannskoðanarvirki onga góðskustýringarskipan hevði, og ikki hevði í umbúna at fáa slíka. Einki mál varð lagt fyri Grannskoðaranevndina í hesum tíðarskeiðinum.

Grundarlagið fyri hesari avgerð var, at eftirlitsskipanin var nýggj fyri føroysku grannskoðararnar. Tænastueftirlitið var at rokna sum ein skiftisskipan, har føroyskir grannskoðarar fóru frá ikki at vera undir nøkrum almennum eftirliti, til eitt ávíst eftirlit, sum tó ikki fekk tær avleiðingar við sær, sum eitt vanligt eftirlit vildi havt.

Hinvegin hevur tað tó frá byrjan verið greitt, at talan var um eina yvirgangsskipan, og at góðskueftirlit í Føroyum skulu verða á sama støði sum í grannalondunum.

Góðskueftirlitið í 2014 og í 2016 og í 2017 eru gjørd við danska góðskueftirlitinum sum fyrimynd. Leiðreglurnar galdandi í Føroyum fyri góðskueftirlitið í 2014, tóku støði í donsku Leiðreglunum fyri 2013. Og Leiðreglurnar í 2016 og 2017 tóku støði í teimum donsku Leiðreglunum í 2015. Leiðreglurnar vóru tó nakað tillagaðar til føroysk viðurskifti.

## 4.1 Einki eftirlit í 2018

Sum áður nevnt, varð einki góðskueftirlit í 2018.

Tann 8. juni 2018 varð fundur hildin við Felagið Føroyskir Grannskoðarar. Á fundinum gjørdi Felagið m.a. galdandi, at Felagið ynskti, at grannskoðaralóggávan bleiv dagførd, soleiðis, at hon samsvarar meira við donsku lóggávuna, og at ynskiligt er, at Grannskoðaraeftirlið sendir leiðreglurnar til viðmerkingar í góðari tíð árið fyri at eftirlit skal verða. Harumframt varð víst á, at arbeiðið hjá eftirlitsfólkunum er ójavnt, og er tað eftir teirra tykki óheppið. Felagið boðaði annars frá, at Felagið er nøgt við mátan, sum Grannskoðareftirlitið praktiserar, eitt nú viðvíkjandi nær átalur verða givnar.

## 4.2 Góðskueftirlitsfólk

Í 2009 gjørdi Skráseting Føroya/Grannskoðaraeftirlitið avtalu við Erhvervsstyrelsen um at brúka donsk skrásett eftirlitsfólk.

Tá talan er um eftirlit av grannskoðanarvirkjum, sum eru fevnd av § 19, stk. 3, verða í Danmark nýtt eftirlitsfólk, sum eru starvssett í Erhvervsstyrelsen. Talan er um statsaut. revisorar, sum eru starvssettir í Erhvervsstyrelsen.

At gera góðskueftirlit á skrásettu grannskoðanarvirkjunum varð somuleiðis avtala gjørd við góðskueftirlitsfólk, sum Erhversstyrelsen hevur góðkent. Sambært § 8, stk. 3 í kunngerð nr. 132 frá 10. desember 2015 um góðskueftirlit og virksemi

Grannskoðaraeftirlitsins, kann Grannskoðaraeftirlitið útnevna góðskueftirlitsfólk frá listum, sum danska Revisortilsynet hevur gjørt yvir góðkend góðskueftirlitsfólk sambært lov om godkendte revisorer og revisionsvirksomheder, sbr. § 33, stk. 9 í grannskoðaralógini. Góðskueftirlitsfólkini gera eftirlitið við ábyrgd og undir eftirliti av Grannskoðaraeftirlitinum.

## 4.3 Generelt um góðskueftirlit

Sambært § 26 í grannskoðaralógini, eru øll grannskoðanarvirkir áløgd at hava eina góðskustýringarskipan, og skulu skjalprógva, at henda verður nýtt.. Sambært 27, stk. 3 í grannskoðaralógini, fevnir góðskueftirlitið um eina meting av góðskustýringarskipanini, og um arbeiðið og óheftnið í sambandi við tær uppgávur, sum grannskoðarin ger. Uppgávurnar eru m.a. at geva grannskoðanarátekningar á roknskapir, heruppií tá grannskoðarin ummælir leiðslufrágreiðingar sambært ársroknskaparlógini, og tá grannskoðarin gevur aðrar váttanir við trygd, ið ikki einans eru ætlaðar til egna nýtslu hjá tí, sum hevur biðið um tær.

Góðskueftirlitið skal kanna, um grannskoðanarvirkini hava eina skipan, sum livir upp til krøvini í grannskoðaralógini og ásetingum annars, undir hesum ISQC 1 *"Kvalitetsstyring i firmaer, som udfører revision og review af regnskaber, andre erklæringsopgaver med sikkerhed samt beslægtede opgaver"* og ISA 220 *"Kvalitetsstyring ved revision af regnskaber"*. Harumframt skal góðskueftirlitið vísa, at skipanin verður brúkt. Hetta verður gjørt við stakroyndum, har grannskoðarin hevur givið grannskoðanarátekningar ella aðrar váttanir við trygd.

Tað er ymiskt, hvussu nógvar sakir eru tiknar út til eftirlit hjá teimum ymisku virkjunum. Hvussu nógvar stakroyndir hava verið, er tengt at, hvussu nógvir grannskoðarar, av teimum sum starvast hjá virkinum, hava undirskrivað roknskapir. Meira fæst at vita um hetta á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya, har Leiðreglurnar eisini eru at finna.

## 4.4 Tilmæli frá góðskueftirlitsfólkunum

Aftaná at góðskueftirlitið er gjørt, fær Grannskoðaraeftirlitið eina frágreiðing frá góðskueftirlitsfólkunum. Í frágreiðingini verður greitt frá góðskueftirlitinum og víst verður á skeivleikar, og møgulig brot á lóggávuna. Frágreiðingin er grundarlagið undir avgerðini, sum Grannskoðaraeftirlitið tekur í sambandi við góðskueftirlitið. Í frágreiðingini eru eisini tilmælir til grannskoðanarvirkini um, hvussu hesi kunnu gera grannskoðanararbeiðið betur innan ávís øki.

Tórshavn, 20. juni 2019

Rannvá Sólheim
forkvinna